HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
KVÍGGJARTÚN 1
POSTBOX 2039
165 ARGIR
FØROYAR

Tórshavn, hin 22. oktober 2015
Málnr.: 15/01699-7

**Viðvíkjandi: Alment útboð - skriva til nýggju heimasíðuna hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni – skjal at leggja á innkeypsportalin**

## Lýsing

Heilsufrøðiliga starvsstovan er í holt við at taka nýggja heimasíðu í nýtslu. Heimasíðam skal verða brúkaravinarliga, upplýsandi, einkul og hava ein “reyðan trá”

Menningin í mun til nýggju heimasíðuna higartil hevur verið

- Pallurin ið síðan koyrur á, er keyptur og settur í verk. Talan er um “Oracle WebCenter” - skipanina.
- Strukturin fyri heimasíðuna er gjørdur og settur í verk - tað vil siga, hvussu síðan er bygd upp .
- Layout fyri nýggju heimasíðuna er gjørt og sett í verk - tað vil siga, hvussu síða sær út, tá man letur síðuna upp.

Í.s.v. íverksetan av heimasíðuni –verður víðari arbeiði gjørt í trimum stigum:

***1. stig.***
Áðrenn heimasíðan verður almenn, verður tilfar lagt út á heimasíðuna sum er avgerandi fyri dagliga virksemið hjá stovninum. Talan er um oyðubløð, lógir, kunngerðir og virkislistar.

***2. stig.***
2. stig er annað tilfar ið skal leggjast á heimasíðuna, soleiðis at síðan er upplýsandi í mun til borgarar, vinnuna og aðrar brúkarar.

***3. stig.***
3. stig er vanligi raksturin av síðuni – serliga framleiðslan av dagligum/vikuligum tíðindi, kunning og annað samskifti – og dagføringar.

Smyrilsvegur 7, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 556 400**
Fax. **+298 556 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http://www.hfs.fo

## Uppgávan ið verður boðin út

Stovnurin fremur sjálvur 1. stig.

Uppgávan, ið verður veitt út, fevnir um 2.-3. stig.

Í mun til 2. stig fevnir uppgávan um at leggja 'fastan' tekst frá gomlu heimasíðunum út á nýggju heimasíðuna, dagføra tekstin og skriv nýggjan teksti fyri ymisk økir. Bakgrundstilfarið hava vit tøkt.

Vit vænta, at næsta stig tekur í tíð, tað ið svarar til 2 mánaðar at gera.

3. stig er vanligi raksturin av síðuni.

Sum part av 3 stigi er ætlanin at tann ið fær uppgávuna skal skipa fyri einum skeiði har frálæra verður givin í at halda stílin, ið er lagdur fyri síðuna. Neyðugt er við tveimum skeiðsdøgum – fyri at flest møgulig kunnu koma á skeiðið.

Síðani snýr uppgávan seg um, viðlíkahald av tí sum tá er komið út á heimasíðuna og so eisini loypandi dagføringar – herundir at tryggja at alt ið loypandi verður lagt út, er í tráð við upprunaliga ætlanirnar – og tær royndir ið eru frá 2. stigi.

Hesin parturin av arbeiðinum verður gjørdur uppá tímasamsýning eftir áheitan frá stovninum. Hetta virksemi kemur at ganga framm til 31/12/2018, tá samstarvið endar.

Serligur dentur verður í hesum sambandi lagdur á, at teksturin skal verða skrivaður á góðum føroyskum máli og verða lætt skiljandi.

Útboðsvinnarin skal bæði gera 2. og 3. stig.

Ítøkiliga kemur útboðsvinnarin at fáa on-line atgongd til heimasíðuna og má tískil kunna seta seg inn í nýggjastu "Oracle WebCenter"-tøkni, hvat heimasíðum viðvíkur.